| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**29. januar 2009** | Blað nr.:<br>**7741** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 29. januar 2009 kl. 17.00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 01/09-49/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Maria Súsanna Hammer Olsen
Levi Mørk
Jógvan Arge
Marin Katrina Frýdal
Bogi Andreasen
Jákup Símun Simonsen
Vagnur Johannesen
Sjúrður Olsen
Jan Christiansen
Annfinn Brekkstein

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.15

**05/08** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 29. januar 2009:** Tikið til eftirtektar.

**06/09** **2006-0036**

**Stuðul til umhvørvistiltøk**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fyri at menna vitan/tiltøk innan umhvørvið í Tórshavnar kommunu, verður skotið upp, at heilsu- og umhvørvisnevndin kann veita stuðul til umhvørvisverkætlanir, sum eru til gagns fyri umhvørvið í Tórshavnar kommunu. Hetta kundi t.d. verið agenda 21 verkætlanir, herundir grønar skúlar v.m. Stuðul kann verða givin til stovnar, virkir, feløg og einstaklingar.

Í hesum sambandi skal støða verða tikin til:
- Hvussu tiltakið skal fíggjast
- Hvussu stór upphædd skal játtast pr. ár
- Endamál við játtanini
- Stuðulstreytir

Neyðugt er, at ein reglugerð ella vegleiðing verður gjørd fyri veitan av stuðli til umhvørvisverndartiltøk, sí hjáløgdu reglugerð frá Innlendismálaráðnum.

Nevnast kann, at Keypmannahavnar kommuna m.a. hevur eina agenda 21 pulju, sum veitir stuðul til verkætlanir, sum m. a. kunnar og rágevir brúkaran um umhvørvisvinarlig innkeyp og um umhvørvið, stuðlar umhvørvisbløðum, kunnandi heimasíðum, fyrilestrum og kampagnum um umhvørvið, útbúgving av ráðgevum innan burturkast v.m.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum og at eitt uppskot til eina vegleiðing verður gjørd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 12. januar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum um at gera eina reglugerð at leggja fyri nevndina aftur.

Nevndin samtykti eisini, at kommunan søkir Innlendismálaráðið um stuðul sambært § 2 í galdandi reglugerð fyri stuðul av játtanini til umhvørvis- og náttúru-verndartiltøk til umhvørvisvikuna 2006.

**Ískoyti:**
Uppskot til reglugerð er hjálagt, sí j.nr. 2006-0036. Umframt hetta skal støða verða tikin til, hvussu tiltakið skal fíggjast, og hvussu stór upphædd verður sett av pr. ár.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at ynski er um, at í § 2, stk. 4, kann undantaksloyvi verða givið í serligum førum.

Nevndin mælir eisini til, at kr. 250.000,00 verða settar av í fíggjarætlanini 2007.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt taka málið upp aftur í.s.v. fíggjarætlan-ina fyri 2007.

**Ískoyti:**
Skotið verður upp, at ein bólkur verður settur at viðgera umsóknir, sum koma inn. Uppskot til umboð í bólkinum: formaðurin í heilsu- og umhvørvisnevndini og 2 umboð frá heilsu- og umhvørvisdeildini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við omanfyri standandi uppskoti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. januar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Víst verður til reglugerð um stuðul til heilsu- og umhvørvistiltøk §3 stk. 1, har umsóknir um stuðul skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári.

Skotið verður upp at broyta freistina í reglugerðini til 1. apríl í hvørjum stuðulsári. Hetta er tí at ynski er um, at kunngjørt verður í umhvørvisvikuni hvørjar verkætlanir stuðul verður veittur til.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Reglugerðin hevur nú verið roynd í 2 ár og vísir royndin, at tørvur er á eini endurskoðan av reglugerðini. Broytingar/tillagingar eru gjørdar til reglugerðina, sí hjálagda notat j.nr. 2006-0036/12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður undir við broytta uppskotinum, og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, tó ynskir nevndin at umsitingin endurskoðar § 2, stk. 4, at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. desember 2008**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Umsitingin hevur endurskoðað §2 stk. 4 í reglugerðini, sí notat j.nr. 2006-0036/15.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum og at beina málið í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 6. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Nú fór Jógvan Arge.

**07/09** **2008-4502**

**Felags yvirlýsing fyri kommunala arbeiðið við burðardyggari menning**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
At hava eina felags yvirlýsing fyri umhvørvisarbeiði í kommununum hevur verið nýtt at skipa og styrkja umhvørvisarbeiðið í grannalondum okkara, Íslandi, Danmark og Noreg.

Agenda 21 stovan skipaði í januar 2008 fyri eini verkstovu fyri kommununum, har evnið var at skipa eina felags yvirlýsing fyri umhvørvisarbeiðið hjá kommunum. Til verkstovuna hevði Agenda 21 stovan gjørt eitt uppskot til eina føroyska yvirlýsing. Uppskotið varð gjørt við støði í teimum norðurlendsku yvirlýsingunum, tó við atliti til føroysk viðurskifti.

Breið semja var um, at ein slík felags yvirlýsing kundi verða við til at styrkja umhvørvisarbeiðið í kommununum, betra møguleikarnar fyri menning á staðnum og samstundis styrkja profilin hjá kommununum millum borgararnar og mótvegis umheiminum.

Í yvirlýsingini er orðað eitt felags stevnumið fyri umhvørvisarbeiðið í kommununum. Harumframt eru nevndir hættir, hvussu burðardygg menning kann gerast ein samantvinnaður partur av kommunala virkseminum.

Málið við yvirlýsingini er at leggja eitt felags støði fyri arbeiðið við burðardyggari menning í kommununum. Yvirlýsingin er ein ætlanaryvirlýsing (hensigtserklæring) og ikki løgliga bindandi. Konkreta arbeiðið, at útfylla punktini í yvirlýsingini, liggur hjá kommununi.

Tær kommunur, ið taka undir við yvirlýsingini, fáa høvi til at undirskriva yvirlýsingina tann 12. desember 2008 á Hotel Hafnia.

Eitt nýtt búmerki er sniðgivið og er ætlanin at kommunur, ið hava sett Agenda 21 á dagskrá, kunnu nýta búðmerkið, t.d. at leggja á heimasíðuna ella í øðrum høpi, tá tað snýr seg um Agenda 21 arbeiði hjá kommununi.

Umboð frá Agenda 21 stovuni kemur at greiða frá.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. november 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:

**Kunning um yvirlýsingar í norðanlondum**
Í norðanlondum eru tryggjar yvirlýsingar: Frederikstaderklæringen, Ólafsvíkur-yfirlýsingin og Aalborg Committment.

Tann norska Frederikstaderklæringen varð tilevnað á eini ráðstevnu í Fredrikstad í 1998, har kommunur, feløg og landsumsiting luttóku.
Fleiri enn helvtin av teimum norsku kommununum har ímillum Oslo kommuna hava higartil tikið undir við Fredrikstaderklæringini.

Ólafsvíkuryfirlýsingin, ið líknar tí norsku Fredrikstaderklæringini, varð orðað á eini íslendskari ráðstevnu í Ólafsvík í 2000. Yvirlýsingin varð síðani send øllum kommunum í Íslandi at taka støðu til. Higartil hava 54 íslendskar kommunur tikið undir við Ólafsvíkuryvirlýsingini, harímillum Reykkjavíkar kommuna.

Nevnast kann eisini Aalborg Committment, sum varð orðað í Aalborg í 2004 á eini ráðstevnu fyri burðardyggar býir í Europa og fekk tí heiti Aalborg Committment. Aalborg Commitment er ætlað øllum europeiskum lokalum myndugleikum og er visiónin soljóðandi: “*vit evropeiskir lokalir mynduleikar vilja staðfesta okkara felags visión um eina burðardygga framtíð fyri okkara býir”*.

Kommunur, ið hava skrivað undir hesa yvirlýsingina eru m.a. Odense kommuna og Middelfart kommuna, sum skrivaðu undir á Konferencuni “One small step” í Odense í september 2008. Higartil hava umleið 600 evropeiskar kommunur tikið undir við Aalborg Commitment, harímillum 6 danskar kommunur, 3 norskar kommunur, 12 svenskar kommunur og Reykjavíkar kommuna.
Aalborg Commitment er meiri umfatandi enn Fredrikstaderklæringen og Ólafsvíkuryvirlýsingin og setir eisini treytir til uppfylging.

Føroyska yvirlýsingin er, sum omanfyri nevnt gjørd við støði í teimum noðurlendsku yvirlýsingunum, t.e. Frederikstaderklæringen og Ólafsvíkuryfirlýsingin og tillaga til føroysk viðurskifti.

Av tí at tað hevur víst seg, at føroysku kommununrnar tørva meiri kunning um málið, verður árligi kveikingardagurin hjá Agenda 21 stovuni tann 12. desember ein kunning um yvirlýsingina, og tí er ætlanin at kommunur fáa møguleika at skriva undir komandi ár.

**Endamál**
Endamálið við yvirlýsingini er at kommunur “binda” seg til at arbeiða við burðardyggari menning, tað verið seg innan øll øki, sum kommunan varðar av.
**Fyrimunir og vansar við at skriva undir Yvirlýsingina**

## Fyrimunir:

- Vísir á eitt altjóða viðurkent virðisgrundarlag á umhvørvisøkinum
- Kommunan gongur fremst og er fyrimynd í arbeiðinum ímóti eini burðardyggari menning
- Styrkir innføringina av burðardyggari menning í allari umsitingini hjá TK og harvið fær umsitingin eina felags uppfatan av burðardyggari menning.

- Gevur kommununi eitt gott yvirlit yvir mál og úrslit innan burðardygga menning.
- Gevur føroyskum kommunum eina felags mynd av hvussu Agenda 21 arbeiðið verður skipað.
- Eitt gott signalvirði mótvegis borgaranum
- Byggir upp eitt netverk millum føroyskar kommunur

## Vansar:

- Møguliga ógreið viðurskifti ella ógreið politisk støða til Agenda 21 stovuna
- Kommunan ikki vil binda seg til at fylgja eini felags yvirlýsing, men vil gera sær sínar egnu karmar
- At yvirlýsingin ikki verður fylgd

Støða ynskist verða tikin til, um polittiski myndugleikin hevur áhuga í at taka undir við yvirlýsingini um burðardygga menning í Tórshavnar kommunu. Viðmerkjast skal, at tað ikki krevur fígging at taka undir við yvirlýsingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til at politiski myndugleikin tekur støðu til um tikið verður undir við yvirlýsingini.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2008:** Málið er útsett.

- Bergmann Finnsson frá Agenda 21 Stovuni kemur at greiða frá.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 6. januar 2009:** Bergmann Finnsson frá Agenda 21 Stovuni greiddi frá um málið.

Nevndin samtykti at taka undir við yvirlýsingini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Jógvan Arge.

**08/09** **<u>2008-4187</u>**

**<u>Umsókn frá Tórshavnar bátafelag um keyp av felagshúsum á matr. nr. 177b, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í skrivi, dagfest 24. september 2008, søkir Tórshavnar Bátafelag um at keypa ognina matr. nr. 177b, við tinglýstum servitutti til Tórshavnar kommunu um forkeypsrætt at keypa ognina aftur, um felagið verður avtikið.

Tórshavnar kommuna stendur sum tinglýstur eigari av ognini. Leigusáttmáli við Tórshavnar Bátafelag er tinglýstur í 2006, og er galdandi í 15 ár, t.e. til 2021.

Felagið hevur ætlanir um at betra og víðka um felagshúsið munandi. Húsini treingja til eina bøtandi hond serstakliga uttan. Veggir/betong er allarhelst í so ringum standi, at tað skulu gerast munandi ábøtur á grundina, um ein hædd skal byggjast omaná.

Yvirtromin er í so vánaligum standi, at hon má gerast av nýggjum.

Í hesum sambandi hevur nevndin í umbúna at byggja eina hædd omaná verandi hús til fyrilestrar, ítriv, fundir og undirvísingarvirksemi innan trygd o.a. hjá bátaeigarum í kommununi. Eisini er tørvur á at gera umstøðlurnar hjá fremmandum bátum, ið vitja, høgligari við at gera verandi felags vaski-, brúsu- og wc-rúm partvíst undir trappuni og kjallaranum, beint inn av bryggjukantinum. Síðani at gera verandi felags vaski-, brúsu- og wc-rúmtil ávikavist menn og kvinnur.

Ætlanin er í stuttum at gera húsini til eina savnandi og prýðiliga perlu í Vágsbotni og býnum sum heild, í framhaldi av ætlanum hjá kommununi at fáa Vágsbotn til eina “nýmótans Nyhavn”.

Tað er trupult at gera munandi íløgur, tá felagið ikki eigur ognina. Tí søkir felagið at keypa ognina matr. nr. 177b.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til antin at selja Tórshavnar bátafelag ognina matr. nr. 177b til mett virði, við tinglýstum servitutti til Tórshavnar kommunu um forkeypsrætt at keypa ognina aftur, um felagið verður avtikið, ella at loyva felagnum at byggja eina hædd omaná verandi hús, at gera umstøðlurnar hjá fremmandum bátum, ið vitja, høgligari við at gera verandi felags vaski-, brúsu- og wc-rúm partvíst undir trappuni og kjallaranum, beint inn av bryggjukantinum og eisini at gera verandi felags vaski-, brúsu- og wc-rúm til ávikavist menn og kvinnur eftir treytum, sum kommunan setur í leigaðum hølum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at gera uppskot til langtíðarleigusáttmála, sum gevur rúmd fyri útbygging av húsunum at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Kartni Olsen, formaður í Bátafelagnum, møtti á fundi og greiddi frá, at Bátafelagið er gingið frá upprunaætlanini at byggja uppá, men ætlar at ríva húsið niður og byggja nýtt í staðin.

Verandi hús er so vánaligt, at tilber ikki at hampa og klæða hetta.

Kartni Olsen greiddi víðari frá, at nýggja húsið skal hava útvent virksemi á kaihæddini, t. e. matstova og pub á høgum støði.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at loyva felagnum at ríva húsini niður og langtíðarleiga Bátafelagnum lendi til nýtt felagshús við teirri treyt, at virksemið á kaihæddini verður útvent og at húsið annars skal lúka treytir, sum byggimyndugleikar seta.

**Býráðið 29. januar 2009:** Einmælt samtykt.

**09/09** **<u>2006-0471</u>**

**<u>Liðuggerð av Gerðisbreyt</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tekniska nevnd hevur á fundi 28. apríl 2005 samtykt, at umsitingin ger eina kostnaðarmeting fyri liðuggerð av Gerðisbreyt at leggja fyri nevndina aftur.

Umsitingin hevur fingið gjørt kostnaðarmeting av liðuggerðini uttan mvg og - grundað á áðurnevndu kostnaðarmeting - gjørt eina meting av samlaða kostnaðinum av liðuggerð av Gerðisbreyt.

Býráðið hevur 23. februar 2006 - j.nr. 2004-2626/61 - játtað 3 mió. kr. av konto 90 til gerð av vegum og keyp av lendi. Vegirnir talan er um her eru:

Gerðisbreyt (liðuggerð) og á Stórheyggi (vegagerð frá verandi vegaskapilsi, ið ikki kann sigast at vera vegur á stigi, sum tekniska deild setir til vegir av slíkum slag, til útstykkingina hjá Jógvani Hans Østerø á Skarpheyggi).

Metingin hjá umsitingini av samlaða kostnaðinum av
- liðuggerð av Gerðisbreyt (4 mió. kr.)
- gerð vegnum á Stórheyggi og keyp av neyðugum lendi (3,4 mió. kr.)

vísir ein samlaðan mettan kostnað uppá 7,4 mió. kr., ið er ein munandi størri upphædd enn, tær játtaðu 3 mió. kr. til báðar vegirnar.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla til at hækka játtanina á konto 90-1011-11150 (Gerðisbreyt og á Stórheyggi) við 4,4 mió. kr.- úr 3,0 mió. kr. til 7,4 mió. kr. fíggjað av íløgum fyri vegir 2007.

Eisini verður mælt til, at arbeiðini verða boðin út í innbodnari lisitasjón millum 4 à 5 arbeiðsatakar. Víst verður annars til mál nr. 2006-3052.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Sjúrður Olsen, samtykti at byrjað verður at gera Gerðisbreyt og at hækka játtanina við einari mió. úr 3 mió. til 4 mió. kr. av íløgum fyri vegir og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Ein minniluti, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari lisitasjón til 5 arbeiðstakarar (4 "smærri" arbeiðstakarar og tann, ið longu er á plássinum). Lisitasjón var mánadagin 11. desember 2006 kl. 17.00.

Umsitingin greiðir frá málinum og kemur við tilmæli á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fara undir arbeiðið at gera vegatkomu frá Stórheyggi í staðin fyri Gerðisbreyt.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Nevndin samtykti at gera vegatgongd frá Gerðisbreyt beinanvegin og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari lisitasjón.

Sambært skrivi frá Sp/f Protek, dagfest 12. des. 2006, var lisitasjón hildin 11. des. 2006, kl. 17.00.

3 tilboð komu inn, og lægstur var P/f H.V.Lützen við 2.794.133,00 kr. u/mvg.

Ráðgevin mælir til at taka við lægsta tilboðnum frá p/f H.V. Lützen.

Við teirri vanligu uppsetingini hjá TK við ókendum, trygging, projekt og eftirliti og TK-mvg metir umsitingin, at liðuggerðin av Gerðisbreyt tilsamans kemur at kosta kr. 3.900.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til,

at taka við lægsta tilboðnum frá p/f H. V. Lützen

at verandi játtan á konto 90-1011-11150 frá 23. febr. 2006 uppá kr. 3.000.000,00 (j.nr. 2004-2626/61) verður brúkt til liðuggerð av Gerðisbreyt
at játtanin verður hækkað við kr. 900.000,00 til eina samlaða játtan til liðuggerð av Gerðisbreyt uppá kr. 3.900.000,00 fíggjað av íløgum fyri vegir 2007.
at farið verður undir arbeiðið í august 2007 (við atliti til byggibúningararbeiðið hjá Jógvani Hans Østerø, sum Byggitek P/F er í holt við).

**Tekniska nevnd 8. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú gongd er komin á arbeiðið, vísir tað seg, at byggingin undir vegnum er framd soleiðis, at húsini á m.a. matr. nr. 38-23b, Gerðisbreyt 16, standa alt ov nær markinum

Fyri at fáa eina haldgóða loysn við somu breidd á koyribreyt og gongubreyt, hava eftirlitið og tekniska deild umrøtt møguleikan at flyta vegin nakað niðaneftir á strekkinum matr. nr. 38-23h (Gerðisbreyt 9) og nakað inn á matr. nr. 38-38-43c (Gerðisbreyt 5).

Ein onnur loysn, um ikki at flyta vegin, hevur eisini verið umrødd.

Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at flyta vegin, men í staðin at smalka gongubreytina fram við Gerðisbreyt 16.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gerð og skuldi sambært undirskrivaðum sáttmála verið liðugt 30. juni 2008. Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum

Gongubreytin á strekkinum Jákupstrøð-Skarpheyggur er í ovaru síðu, meðan hon á strekkinum Norðuri á Heyggi – Jákupstrøð er í niðaru síðu.
Fyri at tryggja gangandi ferðsluna og tarna koyrandi ferðluni og leiða hana "mjúkari" inn á ytra vegastrekkið, mælir umsitingin til gera "hækkaðan gonguteig " uml. 20 m til longdar í veglinjuni móti arbeiðstøkumarkinum móti Jákupstrøð.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ætlanini sum víst á skitsunum í j.nr. 2006-0471/53.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Kunning um avtalu viðvíkjandi nýgerð av Gerðisbreyt á Velbastað – fram við sethúsunum hjá Fróða Hansen, matr. nr. 38-43c.

**Tekniska nevnd 4 desember 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til ætlaðu avtaluna. – j.nr. 2006-0471/73.

Kanning er gjørd av fíggjarstøðuni á kontoini fyri arbeiðið 8. januar 2009 og mettur kostnaður av írestandi arbeiðum vísir eina metta meirnýtslu uppá kr. 300.000,-.

Umsitingin greiðir frá hvørji eykaarbeiðið hava verið neyðug at gera.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til
- at taka undir við avtaluni j.nr. 2006-0471/73 og at beina málið í fíggjarnevndina.
- at meirnýtslan uppá 0,3 mió. kr. verður fíggjað av íløgum til kloakkir.

**Tekniska nevnd 15. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at fíggja av íløgum í 2008.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**10/09** **2008-3946**

**Reinsiverk við Súpanarvík**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Vísandi til fíggjarætlanina fyri 2008, verður biðið um at arbeiðið við projektering og útbjóðing kann verða gjørt her í heyst. Í hesum sambandi er ætlanin at fáa verandi kloakkútlop, ið er sera vánaligt, gjørt samstundis.

**Fíggjarviðurskifti:**
Til hesi arbeiði er avsett ávikavist kr. 1.300.000,- og kr. 600.000,- fyri 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Sp/f Martin E. Leo ger projekt og kostnaðarmeting klárt til útbjóðing í september og at játta kr. 200.000,- til endamálið.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Lisitatiónin var hildin hjá Martin E. Leo 9. desember 2008, kl. 11.00 og komu 4 tilboð inn, sí skriv j.nr. 2008- 3946/4. Sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal hevði lægsta tilboð, sum var krónur 1.288.421,55. u/ mvg.

Kostnaðarmetingin hjá Martin E. Leo var 1.723.300,00 kr.

Tilboðini eru kannað og verður mælt til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal.

**Fíggjarviðurskifti:**
Sum áður víst á, eru samanlagt avsettar í 2008 1.9 mill. kr. til endamálið, og eru áður játtaðar kr. 200.000,00 til projektering.

Samlaður kostnaður við eftirlit,- mvg.og ókendum verður kr. 1.716.821,65. (skjal j. nr. 2008-3946/4)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við tilboðnum frá Sp/f Plan v/ Johs. Hellisdal og at játta kr. 1.525.000,00 av íløgum fyri kloakkir.

**Tekniska nevnd 15. januar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at fíggja av avlopi á íløgum í 2008.

**Býráðið 29. januar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**11/09** **2009-0175**

**Uppskot frá minnilutanum í býráðnum til loysn á trupulleikanum hjá eldri og óhjálpnum í kommununi**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Mælt verður býráðnum til at fáa fatur í 4 av íbúðarblokkunum úti undir Gráasteini til endamálið. Hesir 4 blokkarnir kunna nøkta uml. 80 pláss.

Hetta merkir eisini at tað verður nógv lættari hjá heimahjálpini at loysa uppgávurnar, tá so nógvir brúkarar eru samlaðir á einum stað.

Mett verður at blokkarnir kunnu gerast klárir til endamálið innan 1 ár.

**Býráðið 29. januar 2009:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Sjúrður Olsen, um at beina málið í sosialu nevnd til nærri kanningar, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá Heðin Mortensen, um at mæla frá at taka undir við uppskotinum, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**12/09** **2008-4670**

## Val av 7 limum í skattakærunevndina fyri 4 ár.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar, skal býráðið velja minst 7 limir og tiltakslimir.

Fyrsti fundur hjá nývaldu nevndini verður fyrireikaður av einum av limunum. Kommunan ger sjálv av, hvør tað skal verða.

**Býráðið 20. november 2008:** Tikið av skrá.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin H. Joensen | Katrin Gaard |
| Johan Samuelsen | Sjúrður Johannesen |
| Jógvan Martin Mørk | Ingrid Johannesen |
| Ísak Jacobsen | Ragnar Magnessen |
| Albert Isfeld | Rannvá Ragnarsdóttir |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christianasen |
| Jógvan Thomsen | Sjúrður Olsen |

**13/09** **2008-4673**

## Val av 3 limum í hýruvognsnevndina

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sbrt. hýruvognsreglugerðina skulu 3 limir og 3 tiltakslimir veljast í nevndina.

**Býráðið 29. januar 2009:** Tikið av skrá.

**14/09** **2009-0258**

## Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Jan Poulsen | Eddie Joensen |
| Katrin Joensen | Petur í Gong |
| Martin Dam | Júst Rubeksen |

**15/09** **2009-0259**

**Val av 5 limum í nevndina fyri vardar íbúðir í 4 ár.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Maria Hammer Olsen, Elin Lindenskov, Edith Vang, Rubek Lillå og Magnus Magnussen.

**16/09** **2009-0260**

**Val av limi og varalimi í stýrið fyri Tekniska Skúlan í Tórshavn fyri 4 ár.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Heðin Mortensen og Bogi Andreasen.

**17/09** **2009-0261**

**Val av 7 limum í nevndina fyri grunnin Aberdeen-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Maria Hammer Olsen, Levi Mørk, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen.

**18/09** **2009-0262**

**Val av 7 limum í nevndina fyri grunnin Stavanger-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Heðin Mortensen, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**19/09** **2009-0263**

**Val av 3 limum í nevndina fyri grunnin Nuuk-Reykjavík-Tórshavn**

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**20/09** **2009-0264**

**Val av limi og varalimi í skúlanevndina á Føroya Handilsskúla.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Heðin Mortensen og Bogi Andreasen.

**21/09** **2009-0266**

**Val av limum í nevndina fyri M. A. Jacobsens virðislønina fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært reglugerðina fyri nevndina velur Rithøvundafelag Føroya ein lim, Fróðskaparsetur Føroya (setursráðið) ein lim og Tórshavnar býráð 3 limir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Rigmor Dam, Erling Isholm og Jákup Jacobsen.

**22/09** **2009-0267**

**Val av limi í nevndina hjá ítróttarhøllina á Hálsi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nevndin er ein 3-mannanevnd, har ítróttarfeløgini Neistin, Kyndil, Badminton-felagið,
B36 og HB velja 2 limir, meðan býráðið velur tann triðja limin.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdur varð Heðin Mortensen.

**23/09** **2009-0268**

**Val av 2 limum í nevndina fyri Føroya Barnaheim fyri 4 ár.**

Sambært reglugerðini fyri heimið skal býráðið velja 2 limir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Levi Mørk og Rannvá Ragnarsdóttir.

**24/09** **2009-0269**

**Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Katrin Gaard, Bjarni Dahl, Tóri á Kák Olsen, Mads A. Winther og Gunnar Mohr.

**25/09** **2009-0270**

**Val av 2 limum í Minnisgrunn Sonnu av Skarði.**

Sambært reglugerðini fyri grunnin verður hann stýrdur av eini trímannanevnd, sum býráðið tilnevnir.

Nevndin skipar seg sjálv.

Býráðsformaðurin er føddur formaður.

Hinir báðir stýrislimirnir verða tilnevndir tríggjar ferðir íalt fyri 4 ár hvørja ferðina, men ikki fjórðu ferð, og skulu hava áhuga fyri og skil á handarbeiði, og nýtast teir ikki at vera býráðslimir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Egon Hansen.

**26/09** **2008-4671**

**Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina fyri 4 ár**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu sambært § 4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Í viðmerkingunum til hesa grein stendur, at í teimum størru kommununum, har tað eru nóg nógv fakfólk, eiga fakfólk at manna barnaverndarnevndina.

Viðmerkingarnar tilskila, at lóggevi við viðkomandi førleika ella útbúgving meinar eina miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk, so sum lærari, sjúkrarøktarfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur, sosialráðgevi, námsfrøðingur. Limir í barnaverndarnevndum kunnu tó eisini vera sálarfrøðingur, lækni o.a.

**Býráðið 20. november 2008:** Tikið av skrá.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Ann Elisabeth Joensen | Poula Eidesgaard |
| Hendrik Thomsen | Sjúrður Johannesen |
| Búi T. Brattaberg | Birgir Sondum |
| Hjørdis Heindriksdóttir | Ingvør í Haraldstovu |
| Miriann Jacobsen | Hildigunn Poulsen |

27/09 **2009-0272**

**Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini.**

Sambært §50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýri velja umboð í skúlastýrini.

2 kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal 1 kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 12 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Argja skúli, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli, Hests skúli og Nólsoyar skúli.

Í Hests skúla eru færri enn 20 næmingar.

Býráðið skal sostatt velja 23 umboð í skúlstýrini umframt eykaumboð.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Maria Hammer Olsen | Levi Mørk |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Eysturskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Sankta Frans skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Argja skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Marin Katrina Frýdal | Jákup Símun Simonsen |
| Sjúrður Olsen | Vagnur Johannesen |

**Hoyvíkar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Jákup Símun Simonsen |
| Jan Christiansen | Annfinn Brekkstein |

**Kollfjarðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Vagnur Johannesen | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jógvan Arge | Bogi Andreasen |
| Sjúrðour Olsen | Vagnur Johannesen |

**Nólsoyar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Marin Katrina Frýdal | Bogi Andreasen |
| Karlot Hergeirson | Jógvan Thomsen |

**Velbastaðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |

**Hest skúli**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Halla Samuelsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Jákup Símun Simonsen | Maria Hammer Olsen |
| Jan Christiansen | Sjúrður Olsen |

**28/09** **2009-0045**

**Val av limum og varalimum í stýrið fyri Lágargarð fyri 2 ár.**

Hesir limir standa fyri vali:

**Fastir limir:** **Varalimir:**

| | |
|---|---|
| Beinta Øssursdóttir | Áki Andreasen |
| Marianna Heinesen | Maud W.Hansen |
| Katrin Dahl | Súsanna Dam, sála |

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Ingeborg Godtfred | Áki Andreasen |
| Marianna Heinesen | Beinta Øssursdóttir |
| Inga Dahl | Marita Hentze |

**29/09** **2009-0273**

**Val av 4 limum í nevndina fyri frítíðarstovuna í KFUM.**

Sambært reglugerðini fyri frítíðarstovuna skal býráðið velja 4 limir fyri sítt valskeið, herav 2 eftir tilmæli frá KFUM.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdar vóru Charla Rasmussen og Ingibjørg Hendriksdóttir.

**30/09** **2009-0274**

**Val av einum limi í nevndina hjá Dr. Ingridar Barnagarði fyri 4 ár.**

Sambært reglugerðina fyri barnagarðin skal kommunan velja 1 lim fyri sítt valskeið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald varð Bjørg Danielsen.

**31/09** **2009-0275**

**Val av 3 limum í nevndina fyri Sankta Josefs barnagarð.**

Sambært reglugerðina fyri stovnin skal býráðið velja 3 limir, herav 2 eftir tilmæli frá fransikanarsystrunum.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdur var Ragnar Magnussen.

**32/09** **2009-0276**

**Val av 3 limum í nevndina hjá dagstovninum á Argjum fyri 4 ár**

Sambært reglugerðini fyri stovnin velur kommunan 3 limir fyri sítt valskeið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Jens M. Poulsen, Ingibjørg Berg og Jóhan E. Simonsen.

**33/09** **2009-0277**

**Val av einum limi í nevndina hjá Birkilund fyrr (Vøggustovan og Barnagarðinum á Konmansmýru) fyri 4 ár**

Sambært reglugerðini fyri stovnin skal kommunan velja 1 lim fyri sítt valskeið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdur varð Bogi Simonsen.

**34/09** **2009-0265**

**Val av 5 limum í musikkskúlanevndina.**

Sambært reglugerðini fyri musikkskúlan verður stovnurin stjórnaður av eini 5-mannanevnd.

Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.

Nevndin velur sjálv formann.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Malan Thomsen, Hilmar Augustinussen, Maud W. Hansen, Johan Mortensen og Oskar Eiriksson.

**35/09** **2009-0278**

**Val av ferðslunevnd**

**Býráðið 29. januar 2009:** Tikið av skrá.

**36/09** **2006-0258**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri nýggjum ellisheimi Yviri við Strond sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Tikið av skrá.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Valdar vórðu Katrin Dahl Jakobsen og Beate L. Samuelsen.

**Býráðið 28. februar 2008:** Vald varð Halla Samuelsen fyri Katrin Dahl Jakobsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Halla Samuelsen og Vagnur Johannesen.

**37/09** **2006-1899**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri Karlamagnussarbreyt sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 13. desember 2007:** Vald vórðu Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen.

**Býráðið 11. september 2008:** Vald varð Halla Samuelsen fyri Katrin Dahl Jakobsen

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**38/09** **2007-2044**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri Vinnuøkið á Skarðshjalla 2. stig sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 28. februar 2008:** Valdir vórðu Leivur Hansen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**39/09** **2002-2214**

**Umval av býráðslimi til bygginevndina fyri læknahølið við Karlamagnusarbreyt sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 27. apríl 2006:** Einmælt samtykt og at velja Elin Lindenskov og Bjarti Mohr í bygginevndina.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Vagnur Johannesen.

**40/09** **2007-1961**

**Umval av býráðslimum í stýrisbólkin fyri skúlan á Hamrinum á Argjum, ið settur verður sambært prosjektbygnaðinum, sum lýstur í partalagssáttmálanum**.

**Býráðið 23. september 2008:** Vald vórðu Hildur Eyðunsdóttir og Inga Dahl.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**41/09** **2006-0257**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri rennibreytini sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vórðu Leivur Hansen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**42/09** **2004-1691**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri bygging av ítróttarbygningi – fimleikahallir við norðara enda á Tórsvølli sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við meirilutatilmælinum í mentamálanevndini og at velja Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen í bygginevndina eftir reglunum í § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Mál uttan fyri skrá**

**43/09** **2008-3883**

**Frávik frá ”Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privat bústað” í sambandi útstykking 300 við Myllustjørn. (eisini nýtt mál).**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við útstykking 300 við Myllutjørn eru tað fleiri keyparar, sum hava latið grundstykkið innaftur, eftir at tey hava undirskrivað fyribilsskjeytið. Hesi ynskja at koma innaftur á grundstykkjalistan á tað plássið, tey vóru á, áðrenn tey fóru av. Ynski er grundað á, at tey meta stykkini vera ov dýr og meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi.

Tá ið grundstykkjalistin varð broyttur í mars 2007 var ein meginregla fyri broytingini, at eingin skal flyta aftureftir á listanum. Koma hesi frá útstykking 300 innaftur, koma fleiri aðrir umsøkjarar á listanum at flyta aftureftir. Nakað av ónøgd kann væntast av hesum.

§ 13 um ”Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað” ásetur ”*Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum*

*strikað/ur av øllum bíðilistum*". Hetta verður umsitið soleiðis, at tá keyparar hava undirskrivað fyribils skjeyti, fara tey av grundstykkjalistanum.

Ein onnur umsitingarlig mannagongd er, at keyparar, sum lata stykkið innaftur, fáa ikki peningin fyri grundstykkið aftur, fyrr enn annar keypari er funnin.

Í útstykkingini 300 eru 63 stykkir. Av hesum eru 59 stykkir boðin út. 12 eru komin innaftur + eini 2 eru á veg. Tey 4 stykkini, sum ikki hava verið boðin út, verða eisini boðin út nú (hesi hava ikki verið boðin út orsakað av ivamáli við lendinum).

Fyrisitingin væntar ikki trupulleikar við at selja grundstykkini. Á bíðilistanum eru í løtuni 1787 umsøkjarar og í hesi tillutanini er kommunan komin til nr. 135.

Fyri at síðistillað bæði tey, sum hava latið innaftur og tey, sum møguliga fara at lata innaftur, verður frávikið galdandi fyri øll tey, sum higartil hava keypt grundstykkið í Útstykking 300. Frávikið verður ikki galdandi fyri tey, sum framyvir keypa grundstykkið.

**Tilmæli**
Vísandi til, at keyparar meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin fyri snarskivuna til, at Tórshavnar kommuna gevur keypararum av grundstykkjum í Útstykking 300, loyvi at koma uppá grundsstykkjalistan aftur á sama pláss sum tey høvdu áðrenn keypið, tá ið tey lata grundstykkið innaftur.

Eisini verður mælt til, at keypararnir fáa peningin aftur beinanvegin, sum tey hava goldið fyri stykkið, tá ið tey lata stykkið innaftur.

Tilmælini eru bara galdandi fyri tey, sum higartil hava keypt grundstykkir í Útstykking 300.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og kunna øll á bíðilistanum.

**Býráðið 11. september 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Jan Christiansen samtykkja at bjóða nýggjum keyparum inn til verandi útstykking.

Ein minniluti: Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevdina við áheitan um at taka núverandi útstykkingarætlan aftur og gera nýggja útstykking á økinum við 300 fermetrar stórum grundstykkjum.

**Ískoyti:**
Sambært kostnaðarmeting kemur Útstykkingin við Myllutjørn at kosta:

| **Tekstur** | **Kostnaður** | **Kostnaður pr. stykki** |
|---|---|---|
| Samlað upphædd uttan mvg | 36.015.561,89 | |
| Samlað upphædd við 25% mvg | 43.861.177,36 | 696.209,16 |
| Samlað upphædd við 6,25% mvg | 37.976.965,72 | 602.808,98 |

Um Eigarafelagið stendur sum byggiharri, skal eigarafelagið rinda 25% mvg, og kemur hvørt stykkið tá at kosta kr. 696.209,16. Hvør keypari kann fáa stuðul sambært niðanfyri standandi reglum:

Reglarnar eru:
Íalt kann verða søkt um stuðul uppá kr. 150.000 í meirvirðisgjaldi av arbeiðsløn. Fakturin skal útgreinast á tann hátt, at síggjast skal hvussu stórur partur er arbeiðsløn, og hvussu stórur partur er tilfar. Tó er tað so, at er lutfallið millum løn og tilfar soleiðis, at lønarparturin er **størri** enn tilfarsparturin, verður stuðul veittur við í mesta lagi helvtini av meirvirðisgjaldinum av arbeiðsløn og tilfari samanlagt, sí løgtingslóg nr. 58 frá 7. juni 2007 um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði.

Men hetta merkir, at ”kvotan”, sum hvør keypari annars hevur til sítt stykkið, lækkar samsvarandi soleiðis at ein minni upphædd er eftir, tá ið tey fara at byggja sjálvt húsið í og við, at partur av kvotuni er brúkt til byggibúningina og grundina.

Um kommunan stendur sum byggiharri, verður kostnaður fyri hvørt stykkið kr. 602.808,98, umframt at hvør keypari varðveitir mvg-kvotuna á kr. 150.000 í og við at kommunan rindar 6,25% í mvg.

Kommunan hevði komið at lagt út til útlegg undir øllum umstøðum. Vandin er sjálvandi, at kommunan tekur ábyrgdina sum byggiharri, serliga í mun til stoyping av grundini.

Hesin vandi kann minkast við at kommunan ikki stoypir sokkul og ei heldur fínplanerar. Hetta merkir samstundis, at søluprísurin lækkar og at nýggjar samráðingar um arbeiðstøkuna mugu til í og við, at sokkulin aleina kostar umleið 6 mió. kr. Hetta er meira enn tey 15%, sum kommunan hevur loyvi til at regulera tað tilboðsupphæddina við sambært ABF 06. Í og við at sokkulin verður tikin burturúr verkætlanini, fáa keyparar størri møguleika fyri sjálvi at forma húsini. Prísurin fyri fínplaneringina verður kannaður í løtuni.

Um kommunan velur at vera byggiharri, má støða takast til sáttmálan. Lisitatiónin var 24. apríl 2008 og inn komu trý tilboð:

| | | |
| --- | --- | --- |
| P/F J. & K. Petersen Contractors | kr. | 32.815.928,00 |
| P/F Articon | kr. | 31.232.841,93 |
| P/F Hansen & Jakobsen | kr. | 24.840.686,00 |

Tilboðini eru uttan mvg.

UP Verkfrøði spf hevur kannað tilboðini og mælir til samráðingarnar við P/F Hansen & Jakobsen, ið hevur lægsta boð áljóðandi kr. 24.840.686,00 + mvg.

Atlit má takast til fíggjarstøðuna hjá kommununi soleiðis at skilja, at kommunan ikki byggibúnar 63 stykkir og fær ikki selt meginpartin av stykkinum. Meginparturin av stykkunum eiga at vera seld, áðrenn avtala verður gjørd við arbeiðstakaran. Fyrr var vanligt at siga, at kommunan skuldi hava selt 60%, áðrenn byggibúningin fór í gongd. Hetta svarar til 38 stykkir. Mælt verður somuleiðis til, at keyparar gjalda 40% beinanvegin við undirskriving av fyribils skjeyti og rest tá ið endaligt skjeytið verður tinglýst.

Tórshavnar kommuna hevur ikki tøkan pening til útlegg. Verður kommunan byggiharri eigur tískil eitt byggilán (stuttfreista byggikredit) at útvegast til verkætlanina.

**Spurningarnir eru tískil:**
- Skal Tórshavnar kommuna vera byggiharri?
- Um kommunan gerst byggiharri, skal sokkul og fínplanering takast burturúr verkætlanini?
- Hvussu nógv grundstykkir skulu vera seld, áðrenn byggibúningin byrjar?
- Skal TK taka upp samráðingar við lægstbjóðandi og taka av, um partarnir verða samdir?
- Skal TK figgja verkætlanina við byggiláni?

Um ikki øll stykkir vera seld áðrenn byggibúningin er liðug, má kommunan leggja nakað út fyri írestandi stykkir.

Serstøk byggisamtykt er góðkend í landsstýrinum. Tó eigur fyrisitingin at taka viðurskiftini upp við Matrikulstovuna fyri eisini ”at taka teir í eið”, soleiðis at trupulleikar ikki stinga seg upp eftirfylgjandi.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og miðfyrisitingarstjórin mæla til:
1. at kommunan verður byggiharri
2. at sokkul og fínplanering verða tikið burturúr verkætlanini.

3. at kommunan skal hava selt 38 stykkir, áðrenn byggibúningin verður sett í verk (áðrenn sáttmáli verður skrivaður við arbeiðstakara).
4. at kommunan tekur upp samráðingar við lægstbjóðandi og um partarnir vera samdir, fær heimild at undirskriva sáttmála sambært omanfyristandandi.
5. at kommunan fær heimild at fíggja verkætlanina við byggiláni, og at hetta eisini er komið uppá pláss, áðrenn sáttmáli verður undurskrivaður.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Umsitingin er biðin at kanna matrikuleru viðurskifini og taka upp samráðingar við arbeiðstakaran.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal samtyktu at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og miðfyrisitingarstjóranum tó so, at kommunan skal hava selt 45 stykkir áðrenn byggibúningin verður sett í verk, sambært punkt 3 í tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at annulera lisitatiónina og at gera nýtt projekt, ið inniber vanlig grundstykkir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**44/09** **2007-1833**

**Keyp av bygningi til Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúla**.

**Býráðið 29. januar 2009:** Kunnað varð um at býráðið á fyri læstum hurðum einmælt hevði samtykt at keypa bygningin fyri 6,5 mió. kr.

**45/09** **2006-0260**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri kommunala sambindingarvegnum millum Vegin Langa og Ytra Ringveg sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal og Høgni Mikkelsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen.

**46/09** **2005-1518**

**Umval av býráðslimum í bygginevndina fyri nýggjum røktarheimi við Hoyvíkstjørn sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. januar 2006:** Vald vórðu Katrin Dahl Jakobsen og Beate L. Samuelsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdir vórðu Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**47/09** **2006-2052**

**Umval av býráðslimi í bygginevndina fyri vardar íbúðir á Óðinshædd.**

**Býráðið 21. september 2006:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Elin Lindenskov og Vagnur Johannesen.

**48/09** **2007-1283**

**Umval av býráðslimi til bygginevnd fyri Glyvursveg sambært §36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 23. apríl 2007:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal og Høgni Mikkelsen.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen.

**49/09** **<u>2006-1340</u>**

**<u>Val av býráðslimum til bygginevnd fyri bátahyl á Argjum sambært §36 í kommunustýrislógini</u>**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
| --- | --- | --- |
| Jógvan Arge | Maria Súsanna Hammer Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Sjúrður Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |